# Fleiri og fleiri skip koma í trupulleikar

**Reiðarafelagsformaðurin, Viberg Sørensen, er nógv upptikin um dagarnar, og tíverri eydnaðist okkum heldur ikki í morgun at fáa eina aktuella viðmerking frá honum til støðuna millum reiðarar og manningarfeløg sum framvegis tykist rættiliga fastløst**

Vilmund Jacobsen

Sosialurin hevði fatur í Vibergi Sørensen seinnapartin í gjár, og vit høvdu aftur fatur í honum í morgun. Men bæði í gjár og í dag var hann upptikin á fundi, tá vit hittu hann. Viberg er tó altíð fryntligur at tosa við, og tað er ikki tí, at hann ikki vil gera viðmerkingar, at vit ikki hava eina altuella viðmerking frá felag hansara í blaðnum í dag.



*Formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen, er ein nógv upptikin maður í hesum døgum, nú fiskiflotin liggur, og ósemjan við manningarfeløgini ikki tykist helma í*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Fleiri í trupulleikar

Føroya Reiðarafelag metir annars, at høvuðstrupulleikin hjá fiskiflotanum er teir nógv hækkaðu oljuprísirnir.

- Høgu oljuprísirnir gera, at raksturin hjá einum parti av flotanum gevur hall fyri rentur og avskrivingar. So hvørt sum oljuprísurin hækkar, koma støðugt fleiri skip í hesa støðuna, sigur felagið.

Høvuðskravið hjá felagnum til hesar sáttmálasamráðingarnar hevur tí verið, at hjá øllum skipabólkum skal ein partur av oljuútreiðsluni dragast frá søluinntøkuni, áðrenn hýran verður roknað.

- Partarnir gjørdu avtalu um hetta undir sáttmálasamráðingunum í 2005, og felagið hevur kravt, at tað sonevnda oljuprotokollatið, sum partarnir undirskrivaðu tá, verður sett í verk.

Tá protokollatið varð gjørt, var oljuprísurin 2,20 krónur fyri liturin. Í avtaluni verður sagt: "Um listaprísurin á brenniolju fer upp um 2,90 krónur fyri liturin í einum samanhangandi tíðarskeiði á 30 dagar í sáttmálaskeiðnum, skulu sáttmálapartarnir taka upp samráðingar um møguligt býti millum manning og reiðarí av óvanliga høgu oljuprísunum."

Føroya Reiðarafelag vísir á, at í dag er listaprísurin á olju 4,90 krónur.

- Undir hesum samráðingunum hava manningarfeløgini blankt avvíst at standa við hesa avtalu, og tí var ógjørligt at koma til eina semju um ein nýggjan sáttmála, sigur felagið.

### Løgdu skipini

Føroya Reiðarafelag hevur víst á, at í teimum førum, har reiðararnir eru vitandi um, at raksturin støðugt gevur hall fyri rentur og avskrivingar, hava teir skyldu til at gevast, so skuldin til kreditorarnar ikki økist.

- Tí er eingin annar møguleiki enn at leggja skipini, sigur felagið, sum so skjótt, sum samráðingarnar slitnaðu næst seinasta mánadag, kallaðu annan heimaflotan, sum er limur í felagnum, til lands.

**» ... undir samráðingunum hava manningarfeløgini blankt avvíst at standa við eina avtalu, og tí hevur verið ógjørligt at koma til eina semju...**

VIBERG SØRENSEN

Í løtuni er ikki líkt til, at nakar av pørtunum í sáttmálastríðnum hevur hug at venda aftur til samráðingarborðið, og tí er eisini púra óvíst, hvussu drúgt sáttmálaloysi millum reiðarar og manningarfeløg kann gerast.

## Lýsingin sum kallaði flotan til lands

**Tað var hin 17. januar, at Føroya Reiðarafelag kallaði allan heimafotan, sum er limur í felagnum, til lands**

Vilmund Jacobsen

Í áheitan á limirnar, varð sagt, at nú samráðingarnar við manningarfeløgini um nýggjar sáttmálar eru endaðar úrslitaleysar, og sáttmálaloysi er millum partarnar, hevur reiðarafelagið avgjørt, at biðja skip, sum eru limir í felagnum og eru til fiskiskap, um at koma til lands.

Skipini skulu gera tovið ella setuna lidna og síðan sigla til lands.

Hetta var stutta áheitan Føroya Reiðarafelags – og hon var ikki til at misskilja.

Støðan millum reiðarar og manningarfeløg tykist rættiliga fastløst, og eingin er í løtuni førur fyri at meta um, hvussu drúgt verkbannið kann gerast.

*vilmund@sosialurin.fo*